Fuglafjørður

# Oljugoymsla fyri 25 mió. krónur

**Týsdagin varð ”Felagið 14.2.2006” stovnað. Felagið, sum hevur fingið prinsipielt byggiloyvi frá Fuglafjarðar kommunu, hevur til endamáls at eiga og reka oljugoymslu**

OLJUFELAG

*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Føroyingar hava nú fingið eitt nýtt oljufelag, sum er stovnað undir navninum, ”Felagið 14.2.2006”. Enn er felagið ikki skrásett, men tað verður gjørt í nærmastu framtíð, tá ið partapeningurin er goldin.

Stjóri í nýggja felagnum er Janus Rasmussen, sum frammanundan er stjóri í P/F Bergfrost í Fuglafirði. Nevndarformaður er Dávid Jacobsen, ið umboðar P/F Vinnu í Gøtu. P/F Vinna er ”hatturin” yvir feløgunum, ið eiga teir tríggjar nótabátarnar, Trónd í Gøtu, Finn Fríða og Jupiter.

Havsbrún í Fuglafirði er eisini við í ætlanini.

### Veita tungolju

Sosialurin hevur tosað við Janus Rasmussen, stjóra í nýggja oljufelagnum.

Hann er fáorðaður, men vil tó siga nakað um ætlaninar, sum felagið hevur.

Janus sigur, at verkætlanin byggir á at skapa grundarlag fyri at veita tungolju í Føroyum til skip, virkir og komandi viðskiftafólk annars.

– Hetta er ein ætlan, sum vit hava arbeitt við heilt síðan í desember 2002, men seinasta árið hevur verkætlanin tikið meira dik á seg.

Janus vísir á, at tungolja er eitt nokso vítt ”begreb”, sum hann tekur til.

– Tungolja finst í fleiri ymiskum blandingum, og vit miðja eftir at kunna veita alla ta olju, sum viðskiftafólk – bæði verandi og komandi – hava brúk fyri.

Hann sigur, at tá ið oljan verður blandað til ymisku sløgini, sum vinnan brúkar, er neyðugt, at hava neyðugu instalatiónirnar á staðnum.

Janus væntar, at verkætlanin í Fuglafirði kemur at kosta einar 25 miljónir krónur.

– Hetta er tað, sum vit í útgangsstøðinum rokna við, leggur hann aftrat.

Spurdur, nær hann væntar, at møguligt verður at selja tungolju í Føroyum, sigur Janus, at tað neyvan er hugsandi, at verkætlanin verður liðug í hesum árinum.




*Alt bendir nú á, at Fuglafjørður verður fyrsta havnin í Føroyum, sum kann útvega skipum, virkjum og komandi viðskiftafólki annars tungolju*

*Mynd: Vilmund Jacobsen*

– Fuglafjarðar kommuna hevur útvegað okkum grundøki, og vit hava fingið prinsipielt byggiloyvi.

Hann sigur, at felagið hugsar sær, at goymslan og útbúnaðurin annars stendur uppi og klár at taka í nýtslu skjótast gjørligt.

– Men tað er órealistiskt at hugsa sær, at verkætlanin stendur liðug longu í hesum árinum, sigur stjórin.




*Tað verður lættari hjá skipum at útvega sær tungolju í Føroyum, tá ið verkætlanin í Fuglafirði stendur liðug*

### Tørvurin veksandi

Janus Rasmussen sigur, at tørvurin á einum veitara av tungolju í Føroyum er veksandi – og væntandi eisini kemur at veksa sum frá líður.

Hann sigur, at SEV og Havsbrún brúka tungolju, sum kemur blandað til landið. Aftrat hesum brúka ferðamannaskipini, Smyril og Norrøna umframt nøkur av størru fiskiskipunum, eisini tungolju.

– Jú, tað er einki at ivast í, at eftirspurningurin eftir tungolju í Føroyum er veksandi, sigur stjórin.

Spurdur, um nýggja oljufelagið í framtíðini væntar at gerast einasti útbjóðari av tungolju í Føroyum, sigur Janus:

– Nei, tað mást tú spyrja aðrar møguligar útbjóðarar um, men fyri tann, sum kemur fyrst í gongd, er tað sjálvsagt best fíggjarliga, at vit ikki fáa fleiri útbjóðarar, sigur hann.

Stjórin vísir á, at gongst sum ætlað, kemur ”Felagið 14.2.2006” at hava fyrstu støðina í Føroyum, sum útvegar og selir tungolju til skip og virkir.

---

Hákun Djurhuus, stjóri á Shell:

# Fylgja væl við og gera íløgur eftir tørvi

**– Vit vilja framhaldandi vera ein partur av at veita olju til skipini, sigur stjórin í Shell**

OLJA

*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Stjórin í Shell, Hákun Djurhuus, sigur, at felagið er kunnað um ætlanina hjá nýggja oljufelagnum, sum nú er stovnað undir heitinum, ”Felagið 14.2.2006”.

– Jú, vit kenna ætlanina, og vit hava havt fundir við stigtakararnar, men vit eru ikki við í ætlanini. Gamalt er, at einki er liðugt, fyrr enn alt er liðugt.

Hákun sigur, at ”dialogur” hevur verið millum partarnar, og tosað hevur verið um samstarv, men enn er einki avgjørt.

Hann vísir á, at partar saktans kunnu samstarva, hóast ognarviðurskifti ikki eru millum partarnar.

### Eftirspurningurin

– Eftirspurningurin eftir tungolju er ikki so stórur í løtuni, hóast nøkur skip, eitt nú Finnur Fríði, Krúnborg og Havborg, hava lagt um. Haraftrat brúka Smyril og Norrøna eisini tungolju, umframt SEV og Havsbrún.

Hákun Djurhuus vísir á, at samstarv er millum Shell, SEV og Smyril, har Smyril kann bunkra á Sundi.

– Á Sundi er framd ein tilbygging, sum ger tað møguligt at lata Smyrli, sum tað almenna eigur og rekur, tungolju. Tað er SEV, sum eigur hesar instalatiónirnar.

Stjórin í Shell sigur, at teir í løtuni arbeiða við eini ætlan, sum ger tað møguligt eisini at lata Finni Fríða og Krúnborg tungolju.

– Sum er, er Shell eisini veitari av tungoljuni, sum Havsbrún í Fuglafirði brúkar.

### Íløgur eftir tørvi

Spurdur, um Shell hugsandi fer undir stórar útbyggingar, nú nýggja oljufelagið arbeiðir við veiting av tungolju í Fuglafirði, sigur Hákun Djurhuus:

– Vit fylgja væl við gongdini á hesum øki, og vit ynskja framhaldandi at vera partur av veitingini til skipini.

Men, leggur stjórin aftrat:

– Vit brúka pening í mun til tørvin – og ”forrætningina”, og nú tørvurin á tungolju er avmarkaður, kann eg ikki siga meira um hetta í løtuni, sigur Hákun Djurhuus.